*Tvey lið, sum lótu veður vera veður og royndu at skapa ein góðan dyst. Bæði spældu álopsfótbólt, og hóast úrslitið bendir á stóran mun á liðunum, so var tað meiri javnt og dysturin var góður fyri áskoðaran. Gott støði.*

*Ein sat við kenslu av, at Egil á Bø í stóran mun manglaði í verjuni hjá EB/Streymi. Verjan hjá heimaliðnum sá als ikki gott út uttan aldursforsetan, og tað er ikki gott tekin, at so nógv skal broytast uttan ein einkultan leikara.*

# ÍTRÓTTUR

***HB NÓGVAR SKAÐAR*** *Skaðalistin hjá HB tykist bara at gera longri og longri. Símun Samuelsen og Gunnar Haraldsen eru langtíðarskaddir. Christian R. Mouritsen bíðar framvegis eftir at halurin aftur verður í lagi. Afturat teimum eru René S. Joensen, Tróndur Jensen og Jóan Símun Edmundsson eisini skaddir.*



Myndir: Sigmar Mørkøre

**FJEPPARA SMS**

***Rógvi Dam***
**EB/STREYMUR-FJEPPARI**

*Okkara menn spældu illa í dag, 0 stig á heimavølli er ikki nóð gott, nú skal arðar bollar í suppina um vit skullu vinna á B68 til næsta dyst. Saman standa vit sterk*

at teir oystu nógvar bóltin í málteigin. Tað sá ikki út til, at tamarhald var á støðuni hjá HB í fleiri støðum, men teir dugdu væl at rudda bóltin burtur av vandaleið.

Nyttuleysa stríðið hjá EB/Streymi førdi til fleiri mótálop til HB. Kristin R. Mouritsen rak einu ferðina framvið øllum – eisini málverjanum – men tað gjørdist ov spískt og hann rakti ikki málið. Í yvirtíðini fekk kviki vongleikarin tó ein møguleika afturat, tá ið hann var í fullari ferð í mótálop. Hann rann Marna Djurhuus av sær og stýrdi bóltin framvið René Tórgarð í EB/Streymamálinum og í mál til 3-0, sum eisini gjørdist endaliga støðan.

HB var bara tað betri til at gagnnýta møguleikarnar og var drúgvari sum heild. EB/Streymur hevði møguleikarnar til at spæla seg inn aftur í dystin, men HB vardi væl fyri hesum og revsaði soleiðis at tað gjørdist ein somikið stórur sigur, sum vinnur teimum trý stig á kontuna og heldur harvið muninum til B36 á sjey stigum.

EB/Streymur fekk hinvegin einki burturúr og liggur nú verri fyri í mun til at vinna sær bronsumerkini, hóast møguleikin væl og virðiliga framvegis er til staðar.

*albinus@sosialurin.fo*




## *Andrew av Fløtum:*
# ÓTRÚLIGA VÆL NØGDUR

Andrew av Fløtum, sum var eyðsýndur í Streymnesi og bæði legði upp og skeyt eitt mál, stórfegnaðist um 3-1-sigurin.

– Vit eru ótrúliga væl nøgdir. Vit vistu, at vit skuldu vinna fyri at halda í B36. So vit eru væl nøgdir, ja, segði Andrew av Fløtum eftir dystin.

HB vann sær 2-0-hálvleikasleiðslu og kom undir trýst í seinna hálvleiki, men Andrew sigur, at tað ikki var ætlanin.

– Sjálvandi vildu vit út at skjóta eitt mál afturat beinanveg, men tað kom so ikki fyrr enn til síðst. Men vit royndu at vísa sama viljan sum í fyrra hálvleiki. Menn arbeiddu ótrúliga hart, og eg haldi, at vit eru komnir hartil, at vit vilja tað nú, sigur Andrew, sum metir tað vera torført at fanga grannarnar úr B36.

– Tað verður ótrúliga ringt. B36 liggur øgiliga væl fyri at vinna FM. Tað skal nógv til áðrenn teir missa tað, men vit royna at gera tað, sum vit kunnu. Vit kunnu bara vinna okkara dystir, so má hitt vera, sum tað er, segði Andrew av enda.

## *Rúni Nolsøe:*
# TEIR ERU EFFEKTIVARI

– Stutt sagt er HB effektivari enn vit, tí leikliga eru teir einki frammanfyri okkum. Teir skora upp á feilir hjá okkum í fyrra hálvleiki, segði hann og harmast serliga um, at verjuleikararnir ikki fylgdu Poul Ingason og Andrew av Fløtum inni í brotsteiginum.

Longu í fyrra hálvleiki valdi hann at flyta Marna Djurhuus aftur í verjuna í staðin fyri Høgna Madsen, sum varð fluttur fram á miðvøllin.

– Tað var fyri at fáa betri tak á í verjupartinum. Kanska Høgni og Gert ikki kenna nóg væl hvønn annan til at spæla saman. Vit hava havt nógvar útskiftingar í miðverjuni, og tað er kanska tað, sum kostar okkum í dag.

Eftir hálvleiksteðgin legði EB/Streymur trýst á. Tað var tilætlað, sambært Rúna Nolsøe.

– Vit eru aftanfyri 2-0, so sjálvandi royna vit at fara fram. Vit royndu at halda bóltin á jørðini og senda stikningar til Arnbjørn, og tað eydnaðist eisini at koma til tveir stórar møguleikar og fleiri hálvar. Tað manglaði bara at skumpa hann inni, segði Rúni, sum at enda peikaði á, at hóast hann ikki er nøgdur við úrslitið, so er hann nøgdur við spælið.

**SMS TIL 3. HÁLVLEIK**

*Besta liðið hjá EB/Streymi møtti ikki upp í dag, tí allir vóru í brúðarhús hjá Hans Paula. Tískil møtti 2 liði upp :)*

**EB/Streymur:** René Tórgarð - Jónas Tór Næs, Gert Hansen, Høgni Madsen ▢ (88. Rói H. Olsen) Jóhannes Hansen (63. Arnar Dam) - Gunnar Zachariassen (74. Leif Niclasen) Marni Djurhuus, Rógvi E. Nielsen, Hans Pauli Samuelsen - Niels Pauli B. Danielsen - Arnbjørn Hansen

**HB:** Teitur M. Gestsson - Jógvan Rói Davidsen (27. Bartal Wardum) Jóhan Troest Davidsen ▢, Rógvi Holm, Alex José dos Santos - Levi Hanssen, Heini Vatnsdal, Fróði Benjaminsen, Kristin R. Mouritsen - Andrew av Fløtum ▢ (89. Teit Jacobsen) - Poul Ingason (54. Pál M. Joensen)



1 til 6

**SPÆLARAMETING**

**4 Teitur M. Gestsson**
Reint mál, eina stórbjarging og stúrdi ikki fyri at koma úr málinum at rudda burt. Djarvur og væl upplagdur – gott avrik.

**Jógvan Rói Davidsen**
Ov stutt inni – útsk. Í 27min.

**3 Jóhan Troest Davidsen**
HB-verjuni bilti lítið og einki, og tað átti Jóhan sín lut í. Trygt avrik.

**4 Rógvi Holm**
Vann at kalla allar luftbóltarnar og kom ofta í vegin tá ið trýstið var stórt.

**4 Alex José dos Santos**
Væl upplagdur og teknisku dygdirnar komu til sín rætt. Átti uppleggið til 2-0-málið.

**3 Levi Hanssen**
Fekk ikki nógv burturúr og var millum teir minst sjónligu á HB-liðnum.

**3 Heini Vatnsdal**
Stríddist og fýrdi ikki fyri at seta ferð á ímóti HB-málinum. Var við til at vinna dystin um miðvøllin.

**3 Fróði Benjaminsen**
Stríðsavrikið lá ikki eftir hesaferð heldur. Bant væl samanum og stýrdi miðvøllinum.

**4 Kristin R. Mouritsen**
Setti av álvara ferð á álopsspælið í vinstu síðu. Var avbjóðandi og skoraði eitt mál.

**5 Andrew av Fløtum**
Átti ein fót í tí mest kreativa hjá HB. Sera eyðsýndur við góðum spælingum. Eitt sukursøtt upplegg og eitt mál. Dagsins maður!

**3 Poul Ingason**
Stríddist væl, men bóltin misti hann ov ofta. Tó góðan sans fyri at vera á rætta stað og fekk eitt mál burturúr.

**3 Bartal Wardum**
(innsk. í 27min.)
Sera róligur í verumáta og ger fáar villur. Trygt avrik aftur hesaferð.

